ATLANTIC AIRWAYS
SUMMARKAPPINGIN '09

**Stóra summarkappingin hjá Sosialinum**
Send inn og vinn nógvar flottar vinningar

Vika 25:
Leiðin til London
8 síður við spennandi tilfari um summar

# Vikuskiftistúrur til **London**



Cambridge Unviersity er uppbygd av 31 ymiskum skúlum og er 4. elsta universitet í heiminum



Í Cambridge sær man professarar, íklæddir kápum, á hvørjum hjørni

## Dagur 2 av 4

Hvat er betur enn ein vikuskiftistúrur til London við vinkonuni? Vit eru farnar til London hetta vikuskiftið, við vón um at uppliva ymiskt, sum vit ikki hava møguleika til, í okkara annars so deiliga landi. Vit vóna at uppliva ymiskt, bæði hvat viðvíkur mentan, søgu, shopping, býarlívi og ikki minst tey áhugaverdu og fjølbroyttu matstøðini, sum tann sera metropoliski høvuðsstaðurin hevur at bjóða. Møguleiki er fyri at lesa um okkara vikuskiftistúr í Sosialinum hvønn dag í vikuni, og vónandi er tað ein inspiratión til aðrar føroyingar, sum leingast eftir øðrum upplivingum.

## Cambridge – ein søguligur og mentanarligur býur

Okkara túrur gekk víðari frá Stansted til Cambridge. Hetta var ein sera lættur og skjótur túrur við toki beinleiðis úr Stansted Airport. Túrurin tekur einans ½ tíma og kostar áleið 80 krónur, og er Cambridge sostatt avgjørt vert eina vitjan, um ein hevur áhuga í arkitekuri, mentan ella søgu. Samstundis nýtist einum ikki at hugsa um viðførið, tí tað er møguligt at gjalda millum 50 krónur og 80 krónur og lata viðførið trygt frá sær á jarnbreytastøðini í Cambridge. Okkara avmarkaða tíð hevði við sær, at vit einans høvdu ein dag í Cambridge, men um dagurin er lagdur til rættis, kann man náa nógv upp á nakrar tímar í tí sera áhugaverda býi – einans hálvan tíma uttan fyri London.

## Cambridge Unviersity

Øll hava ivaleyst hoyrt um enska býin Cambridge, og verður hann óivað knýttur saman við lærdómi, av teimum flestu. Hetta kemst av, at Cambridge er ein býur við eitt av tí mest kenda, viðurkenda og prestiguuniversitetum í heiminum, Cambridge University, ið er uppbygd við 31 ymiskum skúlum. Tað fyrsta er frá 1284 og er sostatt 4. elsta universitet í heiminum. Skúlin skuldi fyrst og fremst tæna ríkum bretum, men í fleiri øldir var bara tað eina kynið umboðað á Cambridge University, tí gentur høvdu ikki atgongd til sama lærdóm. Tær fingu ikki møguleika at nema sær eina útbúgving frá Cambridge Univeristy fyrr enn í 1869, tá ið ein gentuskúli endiliga varð stovnaður.

Men skúlin fyri gentur mátti plaserast minimum 30 míl frá øllum øðrum fasilitetum. Hetta, fyri ikki at forstýra teir týdningarmiklu og ríku dreingirnar, sum gingu á Cambridge, so sum Sir Isaac Newton, ið sigst at vera inspireraður til tyngdikraft lógini, eftir at síggja eitt súrepli detta niður úr einum træ.

Sir Isaac Newton var professari í støddfrøði og undirvísti á Cambridge University í nógv ár. Newton búði á universitetinum og uttan fyri hansara íbúð stendur eitt træ, ið sigst at vera eftirkomari av tí upprunaliga 'Newton trænum'.

Aftur til konufólk á Cambridge, so fingu tær fría atgongd til allar skúlarnar í Cambridge í 1947 og fingu samstundis eitt rættiligt prógv og sluppu til próvhandanina eisini. Áðrenn tað, fingu tær bara eina skrivliga váttan uppá, at tær høvdu gingið á Cambridge University og ongan annan heiðūr.

Les meira um okkara upplivingar frá Cambridge á næstu síðu.


Melda teg til Club Atlantic og

VINN FERÐASEÐLAR



og fá sertilboð sendandi við telduposti

Øll, sum tekna seg, eru við í lutakasti hvønn mánað um eina ferð aftur og fram á rutunetinum hjá Atlantic Airways.

Melda til á: www.atlantic.fo

Tel 34 10 00 ATLANTIC AIRWAYS atlantic.fo